

## Lyngby aftur á sporið

Lyngby togaði seg upp aftur á næstfremsta plássið í donsku 1. deild, tá ið liðið í gjár vann stórsigur á Thisted. Dysturin á Lyngby Stadion endaði við 6-2 sigri til Lyngby. Í hálvleikinum var støðan 3-1, og í seinna hálvleiki skoraðu liðini eins nógv mál í part afturat. Christian Lamhauge Holst spældi ikki við hesaferð. Lyngby liggur nú næstfremst í 1. deild við 19 stigum.

## Drykkjuskapur í Bolton

Ísraelski verjuspælarin Tal Ben Haim er kløkkur av, hvussu nógv liðfelagarnir hjá honum í enska felagnum Bolton drekka.

- Spælararnir elska at fara í býin at drekka. Eg eri skelkaður av hesum. Eg vandi í alt summar, men teir gingu fullir í ein mánað, sigur Tal Ben Haim við blaðið News of the World.

Hann undrast tó á, at drykkuskapurin ikki tykist ávirka avrikini hjá spælarunum, tí teir eru væl fyri, og úrslitini eru góð.

VB/Sumba-ÍF 1-4 (1-4):

# Sær svart út hjá VB/Sumba

*VB/Sumba*

*ÍF*



**Suðuroyarliðið hevur nú tapt báðar botnupperðirnar, sum skuldu avgera niðurflytingarstríðið, og avrikini geva lítla vón, um at liðið skal vinna seg upp um strikuna aftur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

ÍF legði fyri sum eitt óløgi í Vági sunnudagin. Longu áðrenn hinir dystirnir kring landið vóru byrjaðir, høvdu fuglfiriðingarnir mest sum gjørt greitt, hvar stigini skuldu.

Væl hjálptir av vindinum øgdu teir alt fyri eitt stórt trýst oman móti heimamálinum, og tað var eisini heilt skjótt, at hetta gav úrslit.

Frá 10. til 27. minutt sendu fuglfirðingar tríggjar bóltar í kassan, og so var dysturin mest sum avgjørdur.

### Uppgevandi

Hóast bæði liðini í dystinum høvdu alt at spæla fyri, so var tað merkisvert, at heimamenninir als ikki tóktust eins gearaðir til uppgávuna, sum fuglfirðingarnir vóru tað. ÍF hevði lætt spæl í vindinum, sum teir høvdu undan, og fer eftir ferð var heimaverjan um ein háls í trýstinum, sum varð lagt á teir.

Nenad Saric legði gestirnar á odda eftir 10 minuttum, og bara níggju minuttir seinni stóð trý til gestirnar og einki til vertirnar. Í báðum førum var tað Atli Petersen, sum var skarprættarin. Nenad økti til 4-0 lítla løtu seinni, og so var tað mest sum fakta, at júst teir báðir málskjúttarnir hava verið glóðheitir seinastu tvey vikuskiftini. Tað vóru nevnliga eisini teir, sum stóðu fyri málunum, tá B36 fyri viku síðani varð sent heim úr Fuglafirði við ongum.

### Vindurin vendi

Stutt undan steðginum minkaði Dan Djurhuus um munin fyri heimaliðið, men høvdu áskoðararnir nú væntað, at VB/Sumba fór at trýsta í undanvindinum, fóru tey skeiv í hesum.

Tí vindurin mest sum hvarv eftir steðgin. Vertirnir royndu tó at flyta nógv fólk niðan á vøllin, men veruligan spenning megnaðu teir ongantíð at skapa. Snøgt sagt, so var ov langt millum nakrar veruligar málmøguleikar, og hóast liðið kendi seg snýtt fyri einum brotssparki, so hevði hetta neyvan gjørt nakran mun í sjálvum sær.

### Sær svart út í Suðuroynni

Úrslitið bar við sær, at ÍF nú er oman fyri niðurflytingarstrikuna, sum alt árið hevur verið ein støðug hóttan. Hvørt tað so eydnast at halda fast um hetta plássið veldst helst í stóran mun um, hvussu leikur fer, tá teir komandi umfarið fáa vitjan av B68.

Og júst tann dysturin ber við sær, at støðan hjá VB/Sumba tykist mest sum púrasta vónleys. Við dystum móti HB, NSÍ og Skála eru útlitini fyri fleiri stigum á ongan hátt ljósareyð, men roknast kann við, at í minsta lagi ein sigur í hesum trimum dystunum er neyðugur, skal liðið hava nakran sum helst kjans.

## Siðvenja skal verða galdandi

**Hóast formansfundirnir ikki telja formliga, so vóru boðini til Kappingar- og Dómsnevndina greið. Hevur spælari einki spæliloyvi, eigur tað at kosta dystin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Páll M. Joensen er endaliga avgreitt. Málið, sum hevur rumblað í føroyskum fótbólti stóran part av hesum kappingarárinum, hevur ferð eftir ferð verið á fótbóltsbreddanum, og fatanirnar um málið hava verið bæði nógvar og ymiskar.

Málið endaði, tá Dómsnevndin gjørdi av at ógilda úrskurðin hjá Kappingarnevndini, og hóast VB/Sumba síðani kærdi hetta til Ítróttardómstólin, so varð avgerðin ikki at vita.

**Siðvenjan skal fylgjast**

Við hesum veik Dómsnevndin hjá FSF frá teirri siðvenju, sum hevur verið galdandi á økinum í nógv ár. Og tað er nakað, sum føroysku fótbóltsfeløgini tykjast vera rættiliga ósamd um.

Málið um spæliloyvi var millum teirra, sum stóð á skrá til formansfundin, og her var útmeldingin púrasta greið. Ein stórur meiriluti av føroysku fótbóltsfeløgunum komu við staðiligari áheitan um, at siðvenjan á økinum skal fylgjast. Hetta so mál av hesum slag ikki gerast drúgvari, enn gott er.

## Rasisma skal úr fótbóltinum

**Eingin felags yvirlýsing varð gjørd, tá føroysku feløgini høvdu fund fríggjadagin. Men einmæld semja er um, at ein møguligur trupulleiki við rasismu, skal takast í størsta álvara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Óli Holm, FSF-forseti, sigur, at fundurin viðgjørdi málið væl og virðiliga. Og orðaskiftið bar boð um, at talan er um ein trupulleiki, sum fleiri feløg hava kent.

- Tað verður ikki soleiðis, at feløgini ella FSF koma við eini felags yvirlýsing, men tað er eingin sum helst ivi um, at hetta er nakað, sum føroyskur fótbóltur tekur kraftiga frástøðu frá.

- At eingin felags yvirlýsing verður gjørd her og nú, kemst einamest av, at ein slík í sjálvum sær ikki loysir nakran trupulleika. Feløgini eru hinvegin á einum máli um, at formenninir nú fara aftur til baklandið hjá sær, har spurningurin verður tikin upp. Altso soleiðis at venjarar, leiðarar og onnur, sum varða av ti, sum fyriferst í øllum feløgunum, verða tikin við í arbeiði. Tí tað er fyrst og fremst við einum aktivum innsatsi, at vit kunnu koma einum slíkum trupulleiki til lívs, sigur Óli Holm.